## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin upp í ein strúk av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av eystri, sunnudagin hvassur vindur av landnyrðingi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 7 og 11 stig.

# Hanus á Summar Festival



**Í seinastu løtu hevur Hanus G. Johansen játtað at verið við á Summar Festivalinum í ár. Hanus hevur ikki spælt alment í fleiri mánaðir, men leygarkvøldið fer hann aftur á pallin í Klaksvík**

SUMMARFESTIVALUR
*Eirikur Lindenskov*

Hanus G. Johansen hevði eina framúrskarandi framførslu á Summar Festivalinum í fjør, og fyrireikararnir høvdu ætlað, at hann skuldi spæla á festivalinum aftur í ár.

Men Hanus hevur borið seg undan at spælt á festivalum og til onnur tónleikatiltøk í summar, og tí var ikki líkt til, at hann skuldi hava framførslu á Summar Festivalinum í ár.

Nú er vent í holuni. Tí í seinastu løtu hevur Hanus G. Johansen játtað at verið við á Summar Festivalinum, og hóast skráin fyri festivalin var løgd, vóru fyrireikararnir ikki í iva um, at pláss skuldi finnast fyri Føroya besta vísusangara á Summar Festivalinum.

Hanus G. Johansen fer tí at spæla leygarkvøldið á Summar Festivalinum, og framførslan hjá honum verður kl. 21.30.

- Vit eru sera fegnir um, at Hanus fer at spæla á Summar Festivalinum í ár. Hanus er ein av størstu persónligheitunum í føroyskum tónleiki, og hann hevur stóran tokka millum fólk. Tí eru vit sera glaðir fyri, at vit hava hann á skránni aftur í ár, siga fyrireikararnir av Summar Festivalinum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 13 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 19 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -- |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 32 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 38 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 19 |
| New York | 29 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 989 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan – norðurum Føroyar – og grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið millum Íslands og Føroya fer spakuliga eystureftir og hevur óstøðugt veður við sær.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/8 kl. 06⁰⁰– 2/8. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 31/7 kl. 06⁰⁰– 1/8 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 5,1 mm



**Vika 30 – 30. juli**
Jokaratal: **3 - 5 - 8 - 6 - 7 - 4 - 4**

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | **30.224.939,- kr.** |
| 6 aftastu røtt: | **104.629,- kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **21.425,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **2.058,- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **240,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **49,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum




**Vika 30 – 30. juli**
Vinnaratøl: **11 - 14 - 16 - 21 - 26 - 33 - 35**

Eykatøl: **03 - 32**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **6.419.463,- kr.** |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | **43.633,- kr.** |
| 6 vinnaratøl | **3.015,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **124,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **39,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum




**TIPS 13 úrslit**
**Vika 30 – 30. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AaB - FC Midtjylland | x |
| 2. | Brabrand - Køge | 1 |
| 3. | HIK - Vejle | 2 |
| 4. | Skjold - Randers FC | 2 |
| 5. | Malmö FF - Elfsborg | x |
| 6. | Brann - Vålerenga | 2 |
| 7. | Lyn - Lillestrøm | 1 |
| 8. | Lille - Rennes | 1 |
| 9. | Nancy - Monaco | 2 |
| 10. | Nantes - Lens | 1 |
| 11. | Paris SG - Metz | x |
| 12. | St.Etienne - Ajaccio | x |
| 13. | Strasbourg - Auxerre | x |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **234.346,- kr.** |
| 12 røtt: | **6.821,- kr.** |
| 11 røtt: | **969,- kr.** |
| 10 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august — Mánin longst frá jørðini
5. august — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. aug | 06.28 | 18.52 | 05.28 | 17.52 | 05.43 | 18.07 | 08.28 | 20.52 | 09.28 | 21.52 | 04.43 | 17.07 |
| 4. aug | 07.15 | 19.38 | 06.15 | 18.38 | 06.30 | 18.53 | 09.15 | 21.38 | 10.15 | 22.38 | 05.30 | 17.53 |
| 5. aug | 07.58 | 20.18 | 06.58 | 19.18 | 07.13 | 19.33 | 09.58 | 22.18 | 10.58 | 23.18 | 06.13 | 18.33 |
| 6. aug | 08.37 | 20.56 | 07.37 | 19.56 | 07.52 | 20.11 | 10.37 | 22.56 | 11.37 | 23.56 | 06.52 | 19.11 |
| 7. aug | 09.14 | 21.32 | 08.14 | 20.32 | 08.29 | 20.47 | 11.14 | 23.32 | - | 12.14 | 07.29 | 19.47 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. aug | 03.43 | 16.07 | 06.43 | 19.07 | 07.43 | 20.07 | 06.13 | 18.37 | 07.28 | 19.52 |
| 4. aug | 04.30 | 16.53 | 07.30 | 19.53 | 08.30 | 20.53 | 07.00 | 19.23 | 08.15 | 20.38 |
| 5. aug | 05.13 | 17.33 | 08.13 | 20.33 | 09.13 | 21.33 | 07.43 | 20.03 | 08.58 | 21.18 |
| 6. aug | 05.52 | 18.11 | 08.52 | 21.11 | 09.52 | 22.11 | 08.22 | 20.41 | 09.37 | 21.56 |
| 7. aug | 06.29 | 18.47 | 09.29 | 21.47 | 10.29 | 22.47 | 08.59 | 21.17 | 10.14 | 22.32 |

5 707265 100036 >